

## Onnur eru eisini komin illa fyri

Tað eru ikki bara konufólkini, sum myndir eru av, ið eru komnar illa fyri av »Golden Maps«.
Myndir eru eisini av naknum gentum, har tú ikki sær andlitið. Nakrir dreingir hava verið skjótir at sett navn á, og leysasøgurnar ferðast skjótt. Sosialurin veit um eina, sum er løgd undir at hava tikið myndir av sær sjálvari, meðan hon hevur verið nakin – hóast tað ikki passar.
Fleiri hava rópt eftir henni í býarlívinum, og hon kennir seg sera illa viðfarna av nøkrum, hon ikki hevur gjørt.

# 10 góð ráð um góða siðvenju á internetinum

1. Gev ongantíð einum, tú ikki kennir, navn og bústað tín
2. Tú kanst hava eitt kelinavn ella geva teg út fyri at vera okkurt annað, um tú bert hevur góðar ætlanir
3. Minst til, at tann tú kjattar við, ikki altíð er hann, hann ella hon sigur seg vera
4. Ikki siga nakað, sum tú ikki meinar, tí tað kann enda galið, um tann tú sigur tað við, ikki skilir tað
5. Tú mást ikki málbera teg rasistiskt, tí tað er í roynd og veru ólógligt
6. Ikki arga nakran við teirra útsjónd, tí tað kann vera ógvuliga særandi
7. Lat vera við at happa ella arga onnur – heldur ikki til stuttleika
8. Hugsa teg um, áðrenn tú sendir ein teldupost ella sms, tí táð móttakarin hevur sæð hann, vendist ikki aftur
9. Ikki hótta onnur til stuttleika, tí tað kann vera trupult at finna úav, at tú ikki meinar tað
10. Ikki halda onnur uttanfyri, uttan so at tú hevur eina góða grund

*Kelda: Dátueftirlitið, Medierådets børneambassadør, www.medieraadet.dk*

## Fongsul í seks mánaðir

Grein 264 d í revsilógini sigur soleiðis:

"**Straffelovens § 264 d** er en væsentlig del af straffelovens **værn mod krænkelser af privatlivets fred.** Bestemmelsen forbyder uberettiget videregivelse af private meddelelser og billeder.

Med bøde eller fængsel indtil 6 måneder straffes den, der uberettiget videregiver meddelelser eller billeder vedrørende en andens private forhold eller i øvrigt billeder af den pågældende under omstændigheder, der åbenbart kan forlanges unddraget offentligheden. Bestemmelsen finder også anvendelse, hvor meddelelsen eller billedet vedrører en afdød person"